# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg eri bangin, tí teir ætla at drepa meg, men eg fari at stríðast og rými ikki av landinum*
*(Patson Chipiro)*

# Kvinnurnar kunnu bjarga Obama forsetasessin

**Barrack Obama tykist hava størri kvinnutekki enn John McCain, og tað kann tryggja honum forsetasessin**



Tær amerikonsku kvinnurnar vilja heldur hava demokratin Barrack Obama enn republikanaran John McCain til forseta, og hetta er vorðið serliga sjónligt, síðani Hillary Clinton gavst við sínum valstríði.

Ein nýggj Gallup-kanning vísir, at 51 prosent av kvinnunum ætla sær at atkvøða fyri Barrack Obama, meðan 38 prosent halda John McCain vera tað betra valevnið. Fyri bara einari viku síðani vóru tølini ávikavist 48 og 43 prosent.

- Nú Hillary Clinton er givin, og veljararnir skulu velja ímillum Obama og McCain, venda nógvar kvinnur eygunum ímóti Obama, sigur Gallup í einari viðmerking til kanningina.

Kanningin hjá Gallup vísir, at McCain fær 47 prosent av atkvøðunum frá amerikonsku monnunum, og at Obama fær 45 prosent.

Hetta merkir sambært Gallup, at Barrack Obama hevði fingið 50 prosent av øllum atkvøðunum, var valið nú, og at John McCain hevði fingið 43 prosent. Í einari kanning hjá blaðnum Wall Street Journal eru tølini ávikavist 47 og 41.

# Kona andstøðuleiðara í Zimbabwe brend livandi

**Kona ein av leiðarunum í andstøðuflokkinum í Zimbabwe bleiv illa viðfarin og síðani brend livandi**

Patson Chipiro var ikki heima, tá viðhaldsmenn hjá Robert Mugabe, forseta lupu á hús hansara. Teir tóku konuna, høgdu báðar føturnar og aðra hondina av henni, áðrenn teir læstu hana inni í húsunum og tveittu eina benzinbumbu inn ígjøgnum eitt vindeyga.

Tá Patson Chipiro kom til hús, stóðu húsini í ljósum loga. Hann rópti á konuna og royndi at sløkkja eldin. Ein smádrongur, sum hevði sæð tilburðin, greiddi honum frá, hvat var hent. Í fyrstani vildi løgreglan ikki taka sær av málinum, men seinni legði ein høgur løgreglumaður uppí, og frágreiðing er nú skrivað.

- Hesir ungu fáa undirvísing í ræðuleika. Teir verða brúktir til at myrða, teimum dámar tað, og teir gera tað fyri pengarnar, sigur Patson Chipiro við bretska blaðið The Times. Hann sigur, at álopsmenninir komu aftur nú eina náttina, men at teir flýddu, tá teir sóu, at hann hevði fleiri viðhaldsmenn heima hjá sær.

- Eg eri ógvuliga ræddur. Teir ætla at drepa meg, men eg havi einki í at velja. Tað er umráðandi, at eg eri her, og eydnast tað teimum at reka meg av landinum, fara onnur eisini at rýma. Eg ætli mær at stríðast her, sigur Patson Chipiro við The Times.



*Nógv viðhaldsfólk hjá andstøðuni í Zimbabwe verða illa viðferðin. Hesin maðurin var teirra millum*
*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Brown vann tepurt

Tað stóð nógv á, tá bretska parlamentið í gjár atkvøddi um eitt uppskot frá stjórnini um at herða lógina ímóti yvirgangi, soleiðis at løgreglan kann hava fólk sitandi í varðhaldi upp til 42 samdøgur, um tey eru undir illgruna fyri at hava samband við yvirgang ella yvirgangsfólk. Mótstøðan ímóti uppskotinum var stór, men tá uppteljingin var liðug, vísti tað seg, at 315 høvdu atkvøtt fyri uppskotinum og 306 ímóti. Fleiri tinglimir hjá stjórnarflokkinum atkvøddu ímóti. Eygleiðarar í London siga, at sigurin hjá stjórnini var sera týdningarmikil, tí kanningar hava víst, at umdømið hjá arbeiðaraflokkinum og Gordon Brown er í botni.



*Gordon Brown hevði brúk fyri sigrinum*
*(Mynd: Polfoto]*

### Fongd við Islam

Jean-Louis Tauran, kardinalur, sum umsitur samskiftið millum ta katólsku kirkjuna og onnur trúarsamfeløg, sigur, at fólk í Vesturheiminum eru næstan fongd við Islam, tí tey tosa næstan ikki um annað. Sjálvur er hann í ferð við at fyrireika tingingar millum Vatikanið og onnur trúarsamfeløg. Hansara fyrsta ferð verður til India, har hann fer at leggja dent á, at einki trúarsamfelag er yvir hinum. Fyri einum ári síðani samdust Vatikanið og islamskir leiðarar um at hava samskifti partanna millum.